# gar

aðar í Jyllands-Posten. Eisini hevur Danmark júst fingið sæti í trygdarráðnum í ST, og tað merkir, at tann danski uttanríkispolitiski profilurin brádliga er vorðin meira sjónligur.

At støðan hevur verið álvarslig sæst á teimum londum, ið danska uttanríkismálaráðið mælir dønum frá at vitja. Fleiri av londunum í Miðeystri verða beinleiðis mett at vera vandamikil hjá dønum at vitja.

Tí hevur herleiðslan eisini økt um tilbúgvingina hjá teimum donsku hermonnunum í Irak og Afghanistan. Hetta er tó ikki nakað, ið Kári hevur merkt nakað beinleiðis til enn, tí hermenninir hava ikki fingið nakrar ávísar leiðbeiningar í sambandi við nýggju støðuna hjá dønum í Miðeystri.

– Tú kanst ongantíð fyrireika teg 100 prosent til eina slíka uppgávu. Vit hava fingið frágreiðingar frá fleiri hermonnum, ið eru afturkomnir úr Irak, men hetta eru bert hent ráð at hava við sær. Tú mást uppliva tað á egnum kroppi, áðrenn tú kanst siga við vissu, um tú ert klárur til uppgávuna, sigur Kári avgjørdur, tá hann verður spurdur um, hvussu fyrireikingarnar hava verið.

Kári greiðir frá, at tað kemur fyri, at hermenn verða sendir heim, tá tað gerst teimum greitt, at teir ikki megna uppgávuna, ið teimum er litin í hendur. Um tú ikki ert nóg væl fyri sálarliga og ikki megnar at handla í kritiskum støðum, kanst tú seta felagar tínar í stóran vanda. Tí er umráðandi, at hermenninir eru árvaknir allar tíðir á samdøgrinum.

## Trupulleikar í Basra

Eitt er Muhammeds-tekningarnar, ið geva trupulleikar, men vikuskiftið undan fráferðini hjá Kára og hansara vinmonnum í herinum, sá ein nýggj gøla dagsins ljós.

Talan er um eina videoupptøku, ið vísir bretskar hermenn buka nakrar irakiskar unglingar. Hendingin er eftir øllum at døma farin fram í Basra fyri umleið tveimum árum síðani, og hon vísir greitt, at bretskir hermenn fara sera illa við nøkrum ungum monnum, ið hava tveitt við steinum eftir bretsku hermonnunum.

Av tí at danska hernaðarlegan, Camp Danevang, liggur í tí bretska økinum kann hetta møguliga eisini geva teimum eitt verri umdømi, men spurningurin er, hvørja ávirkan upptøkurnar í veruleikanum fara at fáa fyri hersetingina hjá teimum sameindu har suðuri í Irak.

Tað seinasta nýggja er, at býráðið í Basra krevur, at donsku hermenninir fara úr Irak, um teir ikki biðja um umbering fyri tekningarnar av Muhammed í Jyllands-Postinum. Harumframt eru mótmælisgongur ímóti harðligu framferðini hjá teimum bretsku hermonnunum á upptøkuni, ið hevur verið víst í irakiskum sjónvarpi.

Hóast øktu hóttanina ímóti donskum hermonnum og ríkisborgarum hevur forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen gjørt greitt, at hetta ikki fer at hava nakra ávirkan á hernaðarligu umboðanina hjá dønum í Irak.

## Framtíð í uniformi

Tá Kári hevur verið teir seks mánaðirnar í Irak, ætlar hann sær ikki at halda fram í herinum.

– Eg havi ætlanir um at fara á HF í Føroyum, og seinni er ætlanin at søkja inn á politiskúlan í Danmark, greiðir Kári frá, tá hann verður spurdur um framtíðarætlanir sínar. Royndirnar í Irak kunnu óivað koma honum til góðar til eina møguliga upptøkuroynd til politiskúlan.

Kári hevur kastað seg útí nakað, sum tey allarfæstu høvdu havt dirvi til. Hetta ber boð eisini um ein mann, sum ikki er bangin fyri at ferðast á markinum, har tann grái massin ongantíð hættar sær. Eingin ivi er um, at tað krevst ein ávís sálarlig styrki og javnvág, um tú til fulnar skalt røkja uppgávuna sum hermaður í einum ófriðarligum landi, og Kári hevur eisini valt ta ultimativu avbjóðingina.



*– Tú kanst ongantíð fyrireika teg 100 prosent til eina slíka uppgávu. Vit hava fingið frágreiðingar frá fleiri hermonnum, ið eru afturkomnir úr Irak, men hetta eru bert hent ráð at hava við sær. Tú mást uppliva tað á egnum kroppi, áðrenn tú kanst siga við vissu, um tú ert klárur til uppgávuna, sigur Kári Jacobsen undan fráferðini*

*Mynd: Símun Jóannesarson*